# Ferðist í Føroyum

**Ferðaráð Føroya fer í vikuni at skipa fyri einum tiltaki í SMS, sum skal vera viðvirkandi til at fáa føroyingar at brúka sína frítíð í Føroyum**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Føroyingar ferðast í Føroyum!

Hesi eru ráðini, Ferðaráð Føroya hevur til fólk, sum leggja sína frítíð til rættis. Á eini ferðastevnu í SMS seinni í vikuni, verða ymsir møguleikar fyri at halda frí í egnum landi lýstir.

Tiltakið í SMS verður hildið í døgunum 12. til 14, mei, undir heitinum »Frí í Føroyum« sigur Sóley Hansen, sum vegna Ferðaráð Føroya skipar fyri hesum tiltakinum.

Hon sigur, at har verður lýst rættiliga nógv ymiskt, sum er at uppliva í Føroyum. Alt frá søgufrásgnum til vitjanir umborð á seglskipum, sum eisini fara at gera onkrar serligar túrar í samband viðtiltakið.

Tiltakið verður ikki skipað sum ein traditionell messa við básum til hvønn luttakaran, uttan sum eitt øki, har tann vitjandi gongur ígjøgnum og upplivir tað, sum sýnt verður fram, greiðir hon frá.

Bæði úti og inni. Tí uttan fyri verður møguleiki at sleppa á rossabak at sita. Hetta, sum vanliga verður nevnt ponyríðing, er serliga ætlað børnunum, men samstundis eitt átak, sum skal lýsa møguleikarnar at ferðast á rossabaki í Føroyum. Felagið, sum stendur fyri hesum, er Davidsen Hestar í Miðvági, greiðir Sóley Hansen frá.

Føroyska ferðavinnan á sjónum er rættiliga væl umboðað á stevnuni, sigur Sóley Hansen. Trý selgskip, Johanna, Norðlýsið og Dragin, eru umboðað, og tey fara øll at liggja Úti undir Bakka hesar dagarnar, so fólk kann vitja umborð.



*Norðlýsið fer saman við Johonnu og Draganum at liggja á Vestaru Vág hesar dagarnar, tiltakið í SMS verður hildið. Fríggjadagin verður gjørdur ein serligur túrur við Norðlýsinum í samband við hetta tiltakið. Myndir er frá einum Dímunartúri hjá Norðlýsinum*
Mynd: Edvard Joensen

Fríggjadagin fer Norðlýsið at gera ein serligan túr í samband við tiltakið í SMS, sigur Sóley Hansen.

Eisini onnur tiltøk, sum til ber at uppliva í Føroyum, verða umboðað á stevnuni. Greitt verður frá um kaving kring Føroyar. Tað er Faroe Dive í Klaksvík, sum stendur fyri tí tiltakinum.

Føroya Náttúrugripasavn greiðir frá um fuglar og sýnir fram útstappaðar fuglar, eins og til ber at hoyra ymisk fuglaljóð.

Á Eiði ber til at sleppa at rógva í Kano Niðri á Vatni (ikki niðara Eiðisvatni, sum í onkrari lýsing stendur. Blðm.) Sagt verður frá hesum tiltakinum, eins og greitt verður frá møguleikum at fiska síl bæði Niðri á Vatni og Suðuri á Vatni, sum eiðisfólk nevna Eiðisvatn. (At fólk nú eru farin at tosa um Eiðsivatn, tá meint verður við tað lítla vatnið Niðri á Vatni, og byrgingarnar hja SEV í staðin fyri Eiðisvatn, er heilt burturvið. Blðm.)

Ferðaráðið hevur sum nakað nýtt sett ymsu tónleikafestivalarnar á ferðakortið, og í ár verður G! Festivalurin umboðaður á hesi stevnuni í SMS.

Men søga og søgn verða ikki gloymd av Ferðaráðnum. Tí fara fólk úr Sandoyar Sýslu Ferðalag at syrgja fyri við teirri sonevndu søgusigingini, ella Storytelling, sum hetta verður nevnt á fremmandum máli.

Ílatin sum fólk vóru í gamlari tíð fara fólk umboðandi verkætlanina »Søguslóður«, sum duga tað kynstrið, at siga livandi frá søgum og sagnum í huinaliga umhvørvinum, sum sett verður upp á Torginum í SMS hesar dagarnar.

Sum vera man verða eisini kunningarstovurnar umboðaðar á stevnunum. Hvønn dag, meðan tiltakið er, verða onkrar av kunningarstovunum í landinum upp á skift umboðaðar á Troginum í SMS.

# Ferðavinna við strendur fyri norðan

**Í seinastu viku var ráðstevna hildin í Føroyum, har luttakararnir vóru fólk úr strandalondum fyri norðan, sum tosaðu um ferðavinnu við støði í gamlari strandamentan**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Í døgunum 28. apríl til 1. mei skipaði Ferðavinnan í Eysturoy fyri fleirtjóða ráðstevnu, har evnið var ferðavinna við strendurnar í londunum fyri norðan.

Ráðstevnan verður nevnd Northern Coastal Experience, og á stevnuni í Føroyum herfyri vóru luttakarar úr Canada, Íslandi , Hetlandi, Noreg, Svøríki og Finlandi umframt úr Føroyum. Hendan ráðstevnan var tann triðja í røðini.

Fyrireikararnir siga um upprunan til hesar fundirnar, at Northern Coastal Experience, NORCE, er ætlað at vera eitt bindilið millum strandamentanir í útnorði. Talan er um eina trý ára verkætlan, sum byrjaði í 2004 og endar í 2007.

Ferðavinnan í Eysturoy er føroyski parturin av hesi verkætlan, og er við fyri at seta Eysturoynna í fokus, siga fyrireikararnir.

Endamálið við hesi verkætlanini er at tosa og samstarva um gamla mentan í strandaøkjunum hvør hjá øðrum. Í okkara føri tosa vit um grindadráp, skjúts og ymiskt, sum farið er fram frá landsnámtíðini til okkara dagar, greiðir Kjartan Dalsgaard, formaður í Ferðavinnuni í Eysturoy frá. Millum annað hevur tíðin, har farið varð frá bóndasamfelag til fiskimannasamfelag, verið lýst.

## Byggja gamlar bygdir uppaftur

Millum luttakararnar á fundinum í Eysturoy hesar dagarnar, vóru fýra sviar úr økinum fram við norðara partin á Botnisku Víkini. Úr býunum Luleå, Skellefteå og Piteå.

Tey greiddur frá, at í teirra øki var farið undir at byggja gomul útróðrarpláss uppaftur. Tað vil siga, at tey settu gomul hús í stand og nýttu tey so til gistingarhus til fólk, sum kom at vitja í økinum.

Í høvuðsheitinum vóru tað sviar, sum vitjaðu, greiddu tey frá. Serliga um summarið. Men um veturin koma alt fleiri útlendingar, sum vilja sleppa at royna at koyra eftir ísinum, sum legst á víkina.

Koyrt verður bæði við kavascootarum og við bili. Serliga hetta seinna er áhugavert hjá frammandafólkunum at uppliva, siga tey.

Um summarið eru tað serliga siglitúrarnir í skergarðinum, sum hava áhuga hjá ferðafólkinum. Alt eftir, sum bátarnir gerast størri og meira nútíðarhóskandi, er ferðafólkatalið eisini vaksið, siga tey.



*Millum luttakararnar á Northern Coastal Experience, NORCE, í Eysturoynni herfyri, vóru Urban Larsson, Yngve Edström, Annika Sander og Göran Wallin norðan úr Botnisku Víkini, shar næsta ráðstevnan av hesum slagnum verður hildin í september í ár*
Mynd: Jens Kristian Vang

Tey síggja mun á ferðafólkatalinum, sum hevur verið vaksandi, síðan tey komu við í hetta samstarvið, sum fær stuðul frá NPP (Northern Peripheri Program) grunninum. Hetta er ein grunnur, har bæði norðurlendskir og ES pengar eru uppií.

Tey siga, at har uppi í Botnisku Víkini hava tey ikki brúkt so øgiliga nógvar pengar sum so til at lýsa í bløðum og við prentlutum við hesum økinum sum ferðamannaøki, sum annars er vanligt. Tey hava heldur lagt seg eftir at nýta internetið, sum røkkur nógv longri, sum tey taka til. Tað er jú heimsumfatandi. Og tey ivast ikki í, at tað eigur ein stóran part av æruni fyri framgongdini í talinum av vitjandi har uppi.

Næsti fundurin av hesum slagnum verður í Skellefteå í september, greiða tey frá. Tá verður temaðið fyri fundin bátasmíð. Serliga fara tey tá at leggja dent á at lýsa bátasmíð, sum tað upp gjøgnum søguna hevur verið í økjunum, sum eru við í samtakinum.